# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um Andreas Christian Samuelsen

# Ein stjørna er slóknað

Góði elskaði Diamamba, mikudagin 13. august, ein sólfagran dag, vart tú ikki millum okkum meira. Hevði tú sjálvur sloppið at valt, vart tú við og hoyggjaði á Trøðni – tað elskaði tú. Men vit sleppa ikki sjálvi at velja og henda fagra dag orkaði tú ikki meira.

Andreas Christian Samuelsen (Lítli) var sonur Mikkjal Samuelsen úr Havn og Ingu, fødd Simonsen, av Viðareiði. Navnið hevði hann eftir abbanum Andreas í Horni, eisini kallaður Bakarin í Horni.

Minnini um teg eru óteljandi, tú vart av flottastu monnum. Tað var altíð stuttligt at vera saman við tær, tí tú hevði altíð okkurt áhugavert ella eina stuttliga søgu at fortelja og eitt gott orð at bera. Sum systkin vóru tú og mamma serliga tætt knýtt og sum nærmasti granni í mong ár komst tú nærum dagliga inn á gólvið, og vit høvdu nógvar og stuttligar løtur í krókinum í køkinum hjá mammu og babba. Tú elskaði at syngja, og dugdi so at siga alla Songbók Føroya Fólks uttanat og nógvar aðrar sangir. Ein sangur, sum tú mangan sang, var Dýrd á vík og vág og serliga orðini: "Hann við líggja, hon við síni rívu, hennar brá og bros – hansar´ skemt og tos – ber bert boð um tvey, ið líka lívið" – tú mintist ommu og abba, foreldur tíni, á bønum, og greiddi frá, hvussu abbi mangan hevði sligið alla Perskonufløtu, har tú vaks upp, einsamallur við líggja, og hvussu ongin maskina kundi sláa so væl og javnt sum abbi.

Sum smágenta dámdi mær framúr væl at vera saman við tær. Eg minnist, tá vit komu heim at ferðast hjá ommu og abba í Havn. Vit sluppu í kjallaran at fletta saman við tær. Tú lærdi meg at røra blóði av seyðinum, sum omma skuldi brúka til blóðmør, síðani at tumma og skera skinni av beinunum og alt hitt arbeiði, sum skuldi til, inntil krovini vóru klár at hanga upp. Góða handalagið hevði tú bæði frá ommu og abba. Eisini høvdu vit nógvar góðar løtur í fjósinum hjá abba, har tú lærdi meg at sópa og mjólka, og øll børnini í grannalagnum spældu í hoynum



eftir at hoyggið var borið inn. Seinni lærdi tú meg eisini at mála, tú vísti mær, hvussu eg skuldi pussa, spartla og grunda og at finna ta røttu málingina. Øll árini eg var niðri og las og arbeiddi, vart tú altíð góður at heita á í samband við ymiskar uppgávur, ið skuldu loysast, tú kundi tosa og greiða frá í tímavís, serliga tá roknskapir skuldi greinast.

Fáur mundi eisini vera so arbeiðssamur og hjálpsamur sum tú. Tú vart ikki meira enn heimkomin frá arbeiðinum, so vart tú farin í arbeiðsklæðini, har var altíð okkurt at gera, og tað eru fáir garðar í Havn, sum eru so vakrir og væl røktir sum tykkara var.

Sum ungur lærdi tú í Sjóvinnubankanum og vart bankamaður í nøkur ár. Árið 1967-68 arbeiddi tú í Handelsbankanum í Keypmannahavn. Hetta árið minnist eg sera væl, tú fylgdist niður aftur til Danmarkar við "Krónprinsinum" við okkum, og vit høvdu ein minniríkan túr í allarfagrasta veðri, og tú tosaði mangan um hendan túrin seinni. Tú komst at ferðast hjá okkum í Horsens bæði á jólum, á páskum og um summarið. Eg minnist serliga eina gávu tú hevði við til mín, sum var ein gráur spensari og appelsingul troyggja. Babba las, so ráðini vóru ikki so góð beint tá, so eg fegnaðist um henda nýggja gráa spensaran og á næstan hvørjari mynd frá hesum tíðarskeiðnum, er tann grái spensarin við. Umframt at vitja okkum, skrivaði tú eisini nógv brøv til okkara. Babba, sum var so sera góður við teg alt lívið, eigur onkrar yrkingar, sum tú sendi honum, sum tú hevði skrivað. Eitt vers úr einari yrking var soleiðis: "Í teim himmalsku høllum ei sorgin skal tá, meir níva títt eyma bróst, har Frelsarans ásjón tú síggja skalt fá, har myrkur var fyrr, er nú ljóst". Lítið visti tú tá, hvussu beinrakin tú vart við hesi yrking, tá hugsað verður um, hvussu sjúkan, tá bar móti enda hjá tær, nívdi teg og hevði tært títt kæra likam. Ein onnur yrking babba fekk frá tær er endurgivin á síðuni her.

Í 1971 giftust tú og Arnhild á Bergi (Aja), og saman fingu tit tvær døtur, Inga og Elisabeth. Tú eigur eisini tríggjar abbasynir Andrias, Jónas og Elias, sum tú vart sera góður við og errin av og hevði við tær allastaðni til bar.

Í 1972 bygdu tit húsini á trøðni hjá abba. Vit vóru heima og ferðaðust, og babba og tú smíðaðu og løgdu centralvarman inn, hetta minnist eg týðiliga, tí vit sluppu at vera við og spæla og leypa millum sperrurnar. Í 1975 var tað tín túrur at hjálpa okkum, tá vit bygdu, beint við síðuna av, og vit høvdu tann framíhjárætt at hava teg sum granna í nógv ár. Í grannalagnum áttu tú nógvar góðar vinir, sum altíð spurdu eftir tær, nú tú vart vorðin sjúkur. Ein teirra segði tað so vakurt: "Andreas er ikki ein sum man gloymir".

Eitt tíðarskeið búðu tit niðri frá 1982-1992. Tú fórt niður at lesa HD og arbeiddi í fleiri ár hjá Fiskasøluni í Hirtshals. Stór var gleðin tá tit fluttu heimaftur, og tú aftur varð granni hjá okkum. Tú fórt aftur í starvið hjá tær á grannskoðaravirkinum hjá Jógvani Sundstein, seinni Impact, har tú arbeiddi líka inntil sjúkan forðaði tær. Tú vart dugnaligur sum fáur, og millum starvsfelagarnar vart tú sera væl lýddur.

Tolin vart tú sum fáir menn, og hetta merktu vit øll, serliga hesar síðstu mánaðarnar tá sjúkan av álvara gjørdu um seg. Tá vit vitjaðu teg og skuldu fara avstað aftur, segði tú altíð við meg, so leingi tú orkaði: "Jesus verið hjá tær".

Góði elskaði Diamamba, systkin míni Gudmundur, Høgni, Guðrun og eg vilja takka tær fyri alla ta gleði, kærleika og góðsku tú vísti okkum gjøgnum alt lívið. Á grøvini hjá ommu og abba stendur skrivað: "Takk fyri kærleika, strev og stríð, Harrin varðveitir til æviga tíð" hesi orðini vilja vit fegin ogna tær.

Góðu Aja, Elisabeth, Inga, Heri, Andrias, Jónas og Elias, tit hava mist ein mann, pápa, verpápa og abba, ið var sum fáur, og eg vóni, at tit í hesi sváru tíð, sum kemur, kunnu finna troyst og vón í lyftunum um at: "Sum dagur tín er, skal styrki tín vera".

Við hesum fáu orðum og í vónini um at síggja teg aftur, vil eg lýsa frið yvir minni um elskaða mammubeiggja mín Andreas Christian Samuelsen.

**Systirdóttir tín**
**Brynhild Setberg**

*Takk Harri Jesus tú náddi*
*meg syndara fallnan í neyð,*
*takk at tú, sum øllum ráddi,*
*mær frelsu og náði beyð.*

*Takk fyri tær hendur sum bløddu*
*á Golgata træi hin dag,*
*takk fyri tær sálirnar møddu,*
*fingu frið við at líta á tað.*

*Takk fyri tað orðið vit eiga*
*um títt vælsignaða navn,*
*at sálir á havinum breiða*
*til tín kunna leita í havn.*

*Mær leingist nú teg at skoða*
*í heimlandi mínum har,*
*í tí gylta morgunroða,*
*tá eg verði heima hjá tær.*

**Andreas C. Samuelsen,**
**nov. 1967**

## † Andlát og jarðarferðir

Jóanes Mikkelsen í Syðrugøtu, vanliga nevndur Jóa, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum 15. august, 56 ára gamal.

**Dagurin**
**19. august. Sebaldus.** Sigst at hava verið guðrøkin danskur kongssonur, sum var trúlovaður franskari prinsessu. Men hann fór frá henni og gav seg í kleystur í Nürnberg, har hann doyði í hvussu so er fyri ár 1070.